**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 17. apríl 2024, kl. 17.00**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen.
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Pauli T. Petersen frá 15. apríl 2024 frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð 15. apríl 2024 og játtaði at møta.

Eyðun Hansen møtti ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 273**
Ynski frá Dagstovnaøkinum um broyting av nøvnum/heitum
J.nr.: 20052-1-2024

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 8. apríl 2024 ynskir frá Dagstovnaøkinum um broyting av nøvnum/heitum.

Ynskini frá Dagstovnaøkinum um broytingar vóru fylgjandi
1) Dagstovnaøkið broytir navn til Ítóttardagstovnaøkið
2) Frítíðarstovan broytir navn til Kongskjallarin
3) Skúlabólkurin/Smidligt Skifti broytir navn til Brúgvin

Nevndin samtykti einmælt at mæla til, at:
1) Heitið á Dagstovnaøkinum ikki broytir navn.
2) Frítíðarstovan broytir ikki navn.
3) Skúlabólkurin/Smidligt skifti fer aftur til heitið Skúlabólkur.
4) Hølið undir heilsumiðstøðini fær navnið Kongskjallarin

**Viðv. 273**

Bygdarráðið atkvøddi um tilmælið frá Trivnaðar- og Umhvørvisnevndini:

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, Sára Jógvansdóttir, Laila Haldansen, Anja Haldansen og Ingi Olsen atkvøddi fyri.

John Zachariassen atkvøddi blankt.

Tilmælið frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini varð samtykt.

**Mál 274**
Umraðfesting av játtan til økið rundanum matr. nr. 187d
J.nr.: 30102-1-2023

Mentanarnevndin umrøddi á fundi tann 8. apríl 2024 mál um at seta fleiri neyst í stand við Krambúðina. Nevndin samtykti einmælt at heita á Trivnaðar- og umhvørvisnevndina um at loyva umraðfesting av játtan til Gjógvaráætlanina til at seta fleiri neyst í stand niðanfyri Krambúðina.

Trivnaðar- og Umhvørvisnevdin viðgjørdi áheitanina frá Mentanarnevndini á fundi tann 8. apríl 2024. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at játtanin á kr. 100.000 til Gjógvaráætlanina verður umraðfest til neyst ella hjall á matr. nr. 187d.

**Viðv. 274**
Umraðfestingin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 275**
Umsókn um stuðul – Bátastevnan 2024
J.nr.: 2000002-9-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 10. apríl 2024 umsókn um stuðul til Bátastevnuna 2024.

Í telduposti dagf. 1. mars 2024 sendi Áki Olsen umsókn um stuðul vegna Bátastevnuna 2024.
*"Tað eru meir enn 20 ár síðan fyrstu Bátastevnu. Bátastevnan 2024 verður í døgunum 23.-26. mai, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum fyri allar aldursbólkar."*

Søkt varð um kr. 50.000.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at stuðla við kr. 50.000.

**Viðv. 275**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

*John Zachariassen fór av fundinum vegna ógegni, og luttók ikki í viðgerðini av mál nr. 276.*

**Mál 276**
Fyrispurningur frá Palla Joensen um loyvi til at keypa burtur av lendinum innanfyri bilhús teirra á Fjalsvegi 20.
J. nr. 8202002-3-2021

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 9. apríl 2024 fyrispurning frá Palla Joensen um loyvi til at keypa burtur av lendinum innanfyri bilhús teirra á Fjalsvegi 20. Nevndin mælti til at geva loyvi til at keypa 80 cm av lendinum innanfyri bilhúsið.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá Teknisku nevnd á fundi tann 10. apríl 2024. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja tilmælið hjá Teknisku nevnd og at sejla lendið fyri 250,- kr. fermeturin + 500,- kr. fermeturin fyri asfaltering.

**Viðv. 276**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

*John Zachariassen var aftur á fundinum*

Til viðgerðar fyri **afturlatnari hurð:**

**Mál 277**
Atkoma til Fjalsveg
J. nr. 500002-1-2023

**Mál 278**
Umsókn um leigu av neystalendi
J. nr. 8216002-2-2024

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:30

Sign.:

Bjørg á Røgvi Sára Jógvansdóttir Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen